# Ein sosialistisk skerjing av einum stórum sosiologi

Tað var við stórum áhuga at eg las grein í Sosialinum, ið Virgar T. Dalsgaard skrivaði um franska sosiologin Pierre Bourdieu. Greinin er í føroyskum høpi sjáldsama nærløgd og væl skrivað. Men tá tað er sagt, so er tað eisini okkurt, ið ein kann loyva sær at vera ósamdur við Virgari í, ið vil skerja franska heimspekingin Pierre Bourdieu við at spenna hann fyri eina betongsosialistiska hugmyndafrøðisliga leið, ið stongir fyri øllum kjakið framyvir

*– Pierre Bourdieu var annað enn ein sosialistiskur granskari.*

*"Royndin at varðveita javna er kjarnin í triðja vegs politikkinum"*
Anthony Giddens, 1999.

*"Soleiðis kunnu javnaðarflokkarnir, sum í løtuni hava valdið í Europa, bert vísa á, at tað er neyðugt at hava ein fastan kurs og ein stramman fíggjarpolitik, oyðileggja og avlíva avgerandi sosiala framburðin tey seinastu 200 árini, sum vil leiða til samanbrot av aðalreglum í einari og hvørjari sosialistiskari hugsan (...), ið er hótt av fíggjarligum valdi"*
Pierre Bourdieu, 2001.



*Giddens hevur roynt at gleiva yvir nógvar gjógvir innan sosialástøði serliga við síni strukturatiónsástøði*



*Tað demografiska og sosiala mynstrið er broytt, síðani menn sum Anker Jørgensen, Oluf Palme, Petur Møhr Dam og Atli Dam høvdu nakað at siga*

SJÓNARMIÐ

*Kim Simonsen*

Tað er ikki ofta, at vit síggja greinar í føroyskum fjølmiðlum um franskar heimspekingar og sosiologar. Tí er tað gleðiligt at fólk sum Virgar T. Dalsgaard, ið tykist vita nakað um hetta evnið, hevur sett seg at skriva grein um henda stóra franska sosiolog og heimspeking. Men tað eru fleiri mátar at líta eftir einum stórum intellektuellum risagranskara.

Virgar leggur til brots við at greiða frá, at Bourdieu var professari í sosiologi, men her gloymir Virgar, at Bourdieu sum so mangur úrmælingur undan honum, tók endaligt prógv í heimspeki. Heimspekin er móðir at m.a. sosiologiini, sálarfrøðini og allari náttúruvísund. Tað hava bert so nógvir fakidiotar gloymt, ið nú halda, at heimspeki er eitt eksotiskt tápuligt veruleikafjart humanistiskt fak. Bourdieau, ið var sonur ein postmann, vaks til í Béarn-økinum í fronsku Pyrunæunum. Hann kom úr smáum korum, ið merktu hann gjøgnum lívið. Bourdieau nærkaðist sosiologiini, tá hann byrjaði at arbeiða í Algir í Norðurafrika. Arbeiðið hjá honum við berbarafólkinum og kabylunum gjørdi, at hann byrjaði at hava áhuga fyri antropologi, og frá hesum vaks áhugi hansara fyri sosiologiska arbeiðinum, ið gjørdist hansara lívs kall og virki. Hetta hevur Virgar ikki fingið við, tí hann er meiri áhugaður, sum danska blaðið Information, at skriva um sosialistin Pierre Bordieu. Ikki tí Virgar roynir at ramsa okkurt tilvildarligt um, hvat Bourdieu hevur arbeitt við, men her vantar hann at seta seg niður og hugsa um, ella at skilja, at tað er ein munur á sosiologinum Bourdieu og tí intellektuella privatpersóninum Bourdieu, ið var sera sosialistiskur. Antiglobaliseringsella mótaltjóðagerðingsbókin *"Modild"* er t.d. bert savnaðar kronikkir, hendinga fyrilestrar og greinar, ið ein ikki beinleiðis kann skilja sum gransking.

## Altjóðagerð merkir eisini møguleikar!

Eg eri samdur við Virgari í, at granskingin hjá Bourdieu er sera spennandi og hevur nógv at bjóða. Eg kann ikki reypa av at hava lisið alt, og tað komi eg helst ongantíð at gera (hann hevur eina risaframleiðslu aftan fyri seg), men eg havi lisið nøkur meginverk, og eri sera áhugaður í hesum manni, men eisini ósamdur við Bourdieu í støðum, men enn meiri við Virgarsa lesing av honum. Bourdieu hevur skrivað so nógv, at tey næstu tjúgu árini fara granskarar at arbeiða og kjakast dúgliga um hansara ástøði, tí er tað heldur hugstoytt at Virgar vil enda alt kjak við at seta Bourdieu fram sum ein betongsosialist, ið sum Virgar sigur: "vendi sær ímóti tí skaðiligu *globaliseringini* og vísti á, at nýliberalisman, sum frálíður, bara gagnar amerikonsku imperialismuni, og ger, at vit avreiða øll okkara fíggjarrættindi og geva multinationalum kapitalvaldi heilt fríar hendur til at eyðræna og mergsúgva restina av heiminum". Soleiðis ljóðar retorikkurin hjá Virgari, ið kanska sýnur ein brøkpart av tí ið Bourdieu hevði at bjóða. Somuleiðis er tað at halda, at tað bert finst ein skaðilig globaliseringin nakað tvætl at føra fram sum ein endaligan sannleika. Globaliseringin ella altjóðagerðingin hava eisini við sær ovurhonds øktar møguleikar og merkir ikki bert nýliberalisma ella amerikansk imperialisma. Hetta er ein týpisk 70´ara vinstravend mentanarpessimisma, ið enn bert vil tosa um t.d. amerikanska imperialismu og ikki kjakast um møguleikar við hesum nýggja brá við alheimssamfelaginum. Eg haldi, at hesar dómadagsprædikur bæði frá Bourdieu og Virgari eru ovurhonds negativar, har tankin tykist vera, at vit ikki longur hava tamarhald á nøkrum, ið aftur byggir á ein tanka um at vit einaferð høvdu tamarhald á samfelagnum, okkum sjálvum og øll vóru glað. Vit liva í einum heimi, ið er merktur av øktari einstaklingagerðing, altjóðagerðing, frælsi, lívsformum, avbjóðingum, har tíðin við Stuning eller kaos, "Gud, konge og fædreland" er endaliga farin. Altjóðagerðingin er her, hon hevur nógvar síður og bert ein av teimum er tann økonomiska liberaliseringin. Sosialistar sum Virgar skulu minnast, at einasta mótvektin til økta samskiftið og altjóðagerðingina er, enn einaferð, at krógva seg í nalvaskoðandi nationalstatinum væl vard av einum nationalistiskum deymi, ið at enda bert vil rot og tramanskap. Hetta merkir ikki, at vit noyðast at velja ímillum neoliberalismu ella betongsosialismu. Tankin hjá Virgari tykist vera, at vit í dag eru rótleys, ørkymlað og uttan nakað fótafesti. Tað er á ein hátt rætt, men hetta nýtist ikki vera so negativt — hetta er nakað ein og hvør tíð í veruleikanum eigur og má berjast við. Virgarsa tanki hevur henda skøvuta sangin sum tjóðsang, at vit (eru um reppið at) missa felagsskapin, og hetta at vera ávegis ímóti einum felags máli. Ein reaktión uppá hetta ímyndaða virðistap kann vera eitt hugmyndafrøðiligt uppgávulyndi, har vit ikki longur halda okkum hóma nakrar savnandi visiónir, har vit gerast stuttskygdir pragmatikarar ávegis ímóti samanbrotinum. Ein onnur er tann paniska, ið endar í einari forskansandi re-traditionalisering, tvs. at fólk sjóseta t.d. gamlar siðir, tjóðskaparlig ikonir, kvæði, føroyskan dans, føroysk klæði, har tankin er hann, at svarið finst í fortíðini, tvs. áðrenn samanbrotið. Virgar hoyrir til henda bólk av vinstravendum romantikarum og grátikonum, ið vil brúka Bourdieu til at buka tíðina, ella hvat hann meinar er ein psykotisk tíð, í hel — uttan kjak ella undran. Øll re-traditionalisering er ikki annað enn eitt heldur tragisk umskiftisfyribrigdi, ið hongur fast í fortíðini, í søguni, í kristindóminum ella í politisku hugmyndafrøðini. Soleiðis boðar øll re-traditionalisering eina aftursøkkandi konservatismu, ið bert byggir á ein paniska ótta fyri nútíðini, tí nýggja og á henda hátt forðar hetta fyri framburði.

## Anthony Giddens

Eisini klæðir tað ikki greinina hjá Virgari, at hann glepsar eftir bæði týska heimspekinginum Jurgen Habermas og enska sosiologinum og stjóranum á The London School of Economic and Political Science Anthony Giddens. Habermas hevur ikki nóg nógv dirvi, sigur Virgar, ið er nakað tvætl. Habermas er ein klassikari, eisini um 50 ár, t.d. eru hansara diskursetikkur og tulkingin av borgarliga almenninum so holl ástøði og nágreinilig vísund, at Virgar skal koma við onkrum betri argumentum, áðrenn hesin týski risin kann sigast at vanta mót og ikki grava nóg djúpt. Tað er rætt sum Virgar sigur, at Habermas ikki var so nágreiniligur sum Bourdieu, ið m.a. kannaði nærum øll hugsandi sosial viðurskifti og onnur fyribrigdi sum list, móta, skúlagongd, vald, viðurkenning, lívsstíl o.s.f.v. — hetta kemst av, at Habermas er ein heimspekingur og ikki ein empiriskur samfelagsgranskari so sum Bourdieu endaði við at gerast. Munurin á heimspeki og sosiologi er júst hesin, at sosiologi er ein vísund, meðan heimspeki ikki viðurkennir naturaliserað ella empirisk argument.

Verri er tað við Anthony Giddens, ið verður molddálkaður, tí hann við *The global third way* kjakinum hevur roynt at endurreisa og modernisera europeisku javnaðarrørsluna. Virgar kallar Giddens ein mótasosiolog og ein populist, tí hann m.a. eisini hevur hjálpt Tony Blair í Onglandi. Somuleiðis sigur hann, at modernitetsanalysurnar hjá honum kundu verið gjørdar av Coca-Cola - hetta eru alt ov hørð orð, ið púra vanta argumentatión, ja og helst, at Virgar setur seg inn í stóra ástøðisheimin hjá Giddens. Giddens hevur endurskoðað bæði ta klassisku sosiologiina (Comte, Durkheim, Weber, Marx) og tí nýggju (funktionalismu, strukturalismu og postmodernaða etnometodologi). Eg føli meg kallaðan at verja Giddens frá hesum fordómum, tí henda grein. Giddens hevur roynt at gleiva yvir nógvar gjógvir innan sosialástøði serliga við síni strukturatiónsástøði, har hann endurskoðaði hugtakið um sosiala praksis, agentástøði, vald og handling. Ikki minst hevur hann roynt at skipa sína modernitetstulkingar soleiðis, at tær byggja á eitt støði, ið ger uppreistur ímóti hesum, at skoða sosialar broytingar sum eina positivistiska evolutión, tí at tíð og rúm viðurskiftini eru broytt munandi bæði innan ástøði og í heiminum sum heild. Giddens brúkar bert multikausalar frágreiðingar, ið ofta eru heftar at einum ávísum søguligt høpi. Hugsa vit um gamla stríðið ímillum hermeneutik og positivismu í vísundaástøðini, so meinar Giddens ikki, at samfelagsfrøðin skal royna at finna almennar lógir, men viðurkenna at samfelagið, mótvegis náttúruni, er samansett av fólki, ið virka út frá t.d. virðum og viljum, ið eru eindømi. Hann hevur skrivað bøkur um evni sum t.d. kapitalismu (1971), sjálvsmorð (1971), Max Weber (1972), Emile Durkheim (1972), klassaskipanina (1973), positivismu (1974), elituna (1974), metodu (1976), nationalstatin og harðskap (1985), modernitet (1990, 1991), intimitet og samleika (1991), The Third Way — A Renewal of Social Democracy (1998, 2000, 2001), altjóðagerðing (1999) og eini 15 aðrar bøkur. Giddens leggur m.a. á at skriva um, hvussu globaliseringin hevur ymisk árin á okkum, á okkara siðir, á tað einstaka menniskjað. Somuleiðis gloymir hann ikki at skriva bæði um vandar og frælsi. Giddens hevur nógv projekt, har eitt m.a. er tað statsástøðiliga, ið er serliga viðkomandi fyri Føroyar í hesum døgum.

## Habitus, symbolskur kapitalur og praktiskt skil

Tað mest undarliga er, at Virgar sjálvur roksar bert á skorpuni og kemur tí ongantíð inn um skræðuna á Bourdieusa tonkum, mest tí, at hann bert hevur eitt ókritiskt eyga fyri Bourdieusa sosialu indignatión. Øll tey mest vanligu hugtøkini, ið Bourdieu er kendur fyri, gloymir hann at viðmerkja, ella hann kennir tey kanska ikki, so sum t.d. hansara habitus hugtak og kendu tulkingina av kapitalinum, at tað eisini finst ein symbolskur kapitalur. Habitus er stutt sagt tann skipan av tiltøkum, ið agentar (fólk, stovnar o.s.f.v.) alsamt døma, fata og handla í heiminum. Habitus er skapandi og savnandi hugtak, ið broytir sosialu støðuna hjá tí einstaka til ein savnaðan lívsstíl. Kapitalur finst hjá Bourdieu í ikki minni enn trimum høvuðsformum. Tað er vanligur kapitalur (peningur og materielt tilfeingi), men so finst eisini mentanarligur kapitalur (dannilsi og útbúgving) og somuleiðis sosialur kapitalur (ið, er tað tilfeingi ein agentur hevur við at vera limur í einum ávísum bólki). Omanfyri hetta kemur so symbolskur kapitalur, ið er t.d. virðing og umdømi, ið kann vekslast til hini sløgini av kapitali. Heiður finst bert, um ein bólkur er samdur um, at eginleikar ella ein ávís gerð hevur virði. Bourdieu royndi, sum aðrir sosialkonstruktivistar, at upploysa markið fyri búskap og tað, ið ikki er búskapur.

Ein aðaltanki hjá Bourdieu er, at menniskja leitar eftir viðurkenning, ið er hin mest fundamentala dimensiónin í øllum verkinum hjá Bourdieu. Sjálvt hetta hevur Virgar ikki tíð til at siga nakað um.

Gjøgnum 80ini og 90ini hava sosiologar og heimspekingar sum Anthony Giddens, Jürgen Habermas, Michel Foucault, Ulrick Beck, Zygmunt Baumann og Pierre Bourdieu allir skrivað um politik. Men hetta er langt frá alt, hesir menn hava staðið fyri. Hjá Virgari endar granskingin bert sum politikur, men ringast er tað, at Bourdieu bert verður brúktur av handahógvi fyri at grunda og stuðla undir Virgarsa øði og idiosynkratiska ótta fyri nærum øllum, øðrum enn planbúskapi, pampararørslum og eini doyggjandi mynd av javnaðarrørsluni av í gjár, lesið t.d. 1960inum og 1970inum. Alt má endurnýggjast, somuleiðis má javnaðarrørslan eisini endurskoðast, nú nærum allir arbeiðarar eru endaðir sum funktiónerar í egnum húsi. Skulu vit siga okkurt um politikk, ið bert er ein partur av hugaheiminum hjá Giddens, so er triði vegurin hjá m.a. Giddens og øðrum alt annað enn neoliberalisma ella "marknaðar fundamentalisma", sum Giddens sjálvur kallar tað. Hann og aðrir sosiologar hava roynt at gera teir flokkar, ið liggja til vinstru fyri miðjuna, førar fyri at liva við sosialum broytingum, ið longu hava broytt hugmyndafrøðisliga landakortið í heiminum í dag, ið er merktur av altjóðagerðing, eini vitansstýrdum búskapi og djúpum broytingum av lívinum hjá tí einstaka. Tað demografiska og sosiala mynstrið er broytt, síðani menn sum Anker Jørgensen, Oluf Palme, Petur Mohr Dam og Atli Dam høvdu nakað at siga.

Á hesum økinum er Giddens nógv betur fyri enn Bourdieu, ið bert svaraði aftur ímóti globaliseringini við paranoia og ótta, meðan Bourdieu innan onnur øki er frálíkur, men tað má eg taka upp aftur í onkrum høpi. Giddens leggur fyri við at vilja kjakast, men fyri Virgar er ein og hvør broyting av tí gomlu samfelagsskipanini av sær sjálvum av tí ónda.

Í djúpgrýtinum, tvs. á tí vísundaástøðiliga økinum, eru Bourdieu og Giddens nógv meiri samdir enn Virgar helst hevur hugflog til at ímynda sær. Teir eru báðir eitt slag av sosialkonstruktivistum, Bourdieu meiri enn Giddens, og hava tí jarðlagt eldri fatanir av *homo economicus og homo sosiologicus.* Somuleiðis ástøði sum rational choise, holistiska systemástøði og spæléstøðin eru útskift fyri eina meiri ella minni seinmodernaða aktørástøði. Men tað er enn sum áður munurin á betongsosialistinum Bourdieu og endurnýggjaranum Giddens, ið hevur einasta áhugan hjá Virgar — og tað er ov tunt!

**Onkrar keldur:**


Martin Hollis: *The Philosophy of Social Science* — An Introduction.1994.
Mads Storgaard Jensen: *Dommedagsfesten — En kritik af tidens kulturpessimisme.* 2001.
Anthony Giddens: *The Global Third Way Debate.* 1999.
*The Consequences of Modernity*. 1990.
*Modernity and Self-Identity.* 1991.
*En løbsk verden —Hvordan globaliseringen forandrer vores tilværelse.* 2000.
Lars Bo Kaspersen: Anthony Giddens — *En introduktion til en samfundsteoretiker. 2001*.
Heine Andersen og Lars Bo Kaspersen: *Klassisk og moderne samfundsteori.* 2000.
Pierre Bourdieu: *Texter om de Intellekuella.* 1992.
*Af praktiske grunde.* 1997.
*Modild.* 2001.
*La Distinction. Critique sociale du jugement.* 1979.